# Hørð kapping um íløgukundarnar

**Støðuga lága rentan og broytt uppsparingarmynstur hava av álvara sett ferð á føroyska íløguhugin. Ikki minst, tí tær 10 milliardirnar, sum føroyingar hava í uppsparing, í alt størri mun verða fluttar á virðisbrøv**

ÍLØGUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


*Sambært stjóranum í Landsbanka Føroya verður talan í framtíðini um eitt munandi broytt uppsparingarmynstur. Og tað er hetta, sum føroysku peningastovnarnir í løtuni fyrireika seg til*

Tá Kaupthing sum fyrsta veruliga íløgufelagið trein inn á føroyska fíggjarmarknaðin, var hetta samstundis startskotið til eina menning av sama marknaði. Fyrstu tíðina var menningin kanska ikki so stór. Einamest tí 11. september mest sum punkteraði stóru lýsingarkampanjuna, har »54%« ferð eftir ferð varð skrivað í stórum bókstavum. Hetta talið ímyndaði avkastið, sum Kaupthing hevði vunnið nøkrum av sínum kundum árið fyri. Men við terror-atsóknini á World Trade Center, skrambláðu fleiri av stóru partabrøvunum niðiur í virði. Og tí gjørdist talan í sera nógvum førum um negativt avkast hetta fyrsta árið, sum vanligi føroyingurin av álvara slapp at royna seg á hesum partinum av fíggjarmarknaðinum. Ein negativ uppliving, sum uttan iva eisini setti síni merki í íløguhugin næstu árini.

## Er bara byrjanin

Spakuliga eru hesar negativu upplivingar tó broyttar. Ein føroyskur virðisbrævamarknaður saman við øktum fokus á væl eydnaðu íslendsku útrásina hevur av álvara sligið ígjøgnum seinastu tíðina, og innan bara fáar vikur tykist verulig ferð nú vera komin á menningina. Seinastu tvær vikurnar er valla farin dagur framvið, uttan at tíðindaskriv um nýggjar íløgumøguleikar eru send fjølmiðlunum. Ikki minst frá teimum báðum stóru føroysku peningastovnunum, sum av álvara eru í ferð við at taka upp kappingina við Kaupthing. Og kanska eisini við íslendska Landsbankanum, sum jú eisini sigst vera ávegis á føroyska marknaðin.

Og sambært stjóranum í føroyska Landsbankanum, Sigurd Poulsen, er hetta bara byrjanin.

– Sjálvandi kanst tú tosa um broyttan hugburð til íløgur, men sum so eru hesar bara ávegis. At ferð er komin á júst nú, er helst meira av tilvild, tí bæði Føroya Banki og Sparikassin hava í longri tíð fyrireikað seg til hesi átøkini. Og tí er talan um væl fyrireikað tilboð, sum nú koma á marknaðin.

– Tað gongur nokk nakað av tí, áðrenn vit veruliga kunnu tosa um eina íløgumentan. Men sum frálíður fara vit helst at síggja eina alsamt vaksandi uppsparing í virðisbrøvum. Eftirlønaruppsparingin er komin upp á einar 4,4 mia kr., og eg rokni eisini við, at sethúsaeigarar so líðandi koma at binda sína uppsparing í virðisbrøv, heldur enn í frívirðið á húsum sínum, sigur Sigurd Poulsen.

## Forða kapitalflýggjan

Enn ber tó ikki til at siga, í hvønn mun føroyskir uppsparar hava flutt sínar íløgur yvir á virðisbrøv. Sigurd Poulsen sigur, at tey í løtuni eru í ferð við at gera hagtøl fyri hendan partin av fíggjarmarknaðinum, men at hetta arbeiði enn ikki er liðugt.

Men við 10 milliardum innistandandi í føroyskum peningastovnum, er einki forgjørt í, at teir báðir stóru peningastovnarnir av álvara eru farnir at fyrireika seg á hesum økinum. Verður tað ikki gjørt, kann talan skjótt gerast um heilt stóra kapitalflýggjan yvir á aðrar uppsparingarmøguleikar, og tað er væl hugsandi, sum hevur serligan áhuga hjá hesum.

INNBJÓÐING




www.sansir.fo

MÓTTØKA
Á DEILDINI Í SALTANGARÁ

Í sambandi við at vit hava víðkað og nútímansgjørt okkara hølir, vilja vit fegin bjóða til móttøku

FRÍGGJADAGIN
20. JANUAR 2006 - KL.15.00 - 17.00

Øll eru vælkomin

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari

Næmingur til proviantdeildina

Til proviantdeildina hjá Sp/f Haraldsen í Fuglafirði verður søkt eftir einum næmingi at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Tú kemur at vera partur av einum spennandi arbeiðsumhvørvi, ið gevur nógvar avbjóðingar. Arbeiðið umfatar fyrst og fremst avgreiðslu av proviantordrum og at veita tænastur til skip. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Longdin av lærutíðini er treytað av hvørja skúlagongd tú hevur. Sum næmingur kemur tú at ganga á skúla í Danmark í styttri tíðarskeið.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og viðmælum skal vera Sp/f Haraldsen í hendi í seinasta lagi 23. jan. 2006. Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til Bassa á tel 214 005.

HARALDSEN
Tlf. 444 005



VISTIR UMBORÐ
døgntænasta

**Haraldsen sp/f · Karvatoftir 4 · Postboks 86 · FO-530 Fuglafjørður**
*Haraldsen er fyritøka, ið er stovnað í 1914. Vit reka kolonialhandil og kiosk samstundis sum vit veita proviant til skip. Í løtuni starvast 30 fólk hjá felagnum.*

TEAM85